## Innbúgv

**SOFABORÐ**
v/ glasplátu og sokkli úr marmor, 80x140 cm, til sølu fyri 600 kr.
*Tlf. 223478*

**RULLIGARDINUR TIL SØLU**
Einar rulligardinur 140 x 160, nýggjar, til sølu fyri 100 kr.
*Tlf. 255279*

**SKRIVARABORÐ YNSKIST**
Vanligt skrivaraborð við skuffum ynskist bíliga til keyps.
*Ring á 424437*

**TIL SØLU**
Brúkt dupult boxmadrassa/song, stødd 140 x 200, til sølu fyri kr. 400. Klár at avheinta.
*Tlf. 316774/317654*

**REOL TIL SØLU**
Myrkt, vælhildið hillalag bíliga til sølu.
*Tlf. 333843*

## Lutaseðlar

**FRÁ AMNESTY INTERNATIONAL**
Vinnararnir av lutaseðlunum vóru hesir:
1. vinningur: Marta Olsen, 350 Vestmanna.
2. vinningur: Maud Elmarsdóttir, 100 Tórshavn.
3. vinningur: Gerda Fagradal, 210 Sandur.
Amnesty International takkar fyri stuðulin.
*Amnesty International*

**HAVNAR BÓLTFELAG**
Lutaseðlarnir eru drignir. Hesi nr. hava vunnið:
1) 6195, 2) 2748, 3) 9150, 4) 9291. Vinarliga sigið frá á tlf. 314448 eftir kl. 17.00. Stóra tøkk fyri stuðulin.
*HB*

## Pløgg

**LEÐURSTYVLAR**
Óbrúktir leðurstyvlar, std. 39, til sølu fyri 400 kr. Ca. 8 cm flottan hæl. Ring 224791 ella
*312185, Mariann*

**TIL SØLU**
Lítið, bundið ullint sjal til sølu.
*Lise, 322070*

## Samband

**SAMBAND YNSKIST**
Name: Miss Carolina Jackson.
Address: PO-Box cc 1005, Cape Coast – Ghana. West Africa.
Age: 25 years old, single.
Hobbies: Foreign Culture, misuc, gardening and general interests.

**SAMBAND YNSKIST**
Name: Miss Roxette Mensah.
Address: PO-Box CT 1005, Cape Coast – Ghana, West Afrika.
Age: 26 years old, single.
Hobbies: Swimming, cooking, travel and general interests.

**SAMBAND YNSKIST**
40 ára gomul kvinna ynskir samband við mann ca. 40-45 ár. Tú skal vera stabilur, vita hvat tú vil, hava eitt lætt sinni og vera ein góður dansipartnari. Avgerandi er, at tú er góður við børn. Send eina mynd og nakrar reglur og tú fær svar.
*Bill. mrk. 1251-1*

## Sjavs

**SJAVSKAPPING**
Almenn sjavskapping verður á Kafé Blákross týsdagin 8. jan. kl. 19.00.
*Kafé Blákross*

**SJAVSKAPPING**
verður á Svangaskarði mánakvøldið 7. jan. kl. 18.30.
*B68*

**SJAVSKAPPING**
verður leygardagin kl. 16.00.
*N.S.Í.*

**SJAVSKAPPING**
verður á Strondum sunnudagin 6. jan. kl. 16.00. Leikarar millum 4 tey bestu pørini fáa steyp til ognar.
*Strálan*

## Súkklur

**PRUTL TIL SØLU**
Prutl við tveimum fallhjálmum til sølu fyri 12.500 kr.
*Tlf. 321340*

**YAMAHA NEOS SKUTARI**
árg. 10/2000 er í góðum standi. Fá nærri at vita um skutaran við at ringja
*tlf. 311950 ella 211950*

**SCOOTARI**
Brúktur scootari ynskist til keyps.
*Tlf. 252127 - 315910*

**TIL SØLU**
Svartur scootari av merkinum Honda SFX, í sera góðum standi, lítið brúktur, til sølu.
*Tlf. 443131 ella 220931*

**MOTORSÚKKLA**
Yamaha 650 cc, árg. 85, koyrir væl, til sølu.
*Tlf. 213491*

## Teldur

**TELDA TIL SØLU**
Intel Pentium II 400 Mhz, 20 Gb IBM Harddisk, CD-ROM drev, Matrox G400, Dualhead grafikkort (møguleiki fyri tveimum skíggjum), Soundblaster Live ljóðkort, 256 Mb Ram. K56 Lasat modem, 19" Nokia Monitor. Kostnaður 7.800 kr.
*Tlf. 223478*

**NÝGGJ FARTELDA**
Fujitsu Siemens Amilo fartelda, 1 mðr. gomul, onki brúkt. 750 Mhz celeron, 10 GH harddisk, 192 MB RAM, 12,1 TFT skerm, innbygd modem, netkort, 4MB Silicon 3D grafikkort. Taska fylgir við. Nýprísur: 19.000 kr. Til sølu fyri 16.000 kr.
*Tlf. 312137 ella 250837*

**PLAYSTATION SPØL**
In cold blood, Parasite, Eve 3 við fleiri til sølu fyri 100 kr. stk.
*Tlf. 448097*

**TELDA TIL SØLU**
Pentium 166 Mhz MMX, 32 MB ram, 6,4 GB harðdisk, CD-Rom drev, ljóðkort, 3COM modem, 15" skerm, til sølu fyri 2500,- kr.
*Tlf. 422364*

## Tónleikur

**BANG OG OLUFSEN**
YNSKIST TIL KEYPS. Um tú skuldi átt ein brúktan fløguspælara ella/og kasettuspælara av merkinum B&O 6000 ella 8000 ella harumleið, sum tú kundi hugsað tær at selt, ger so væl at ringja
*213356/313356*

**DALI 909**
Brúktir Dali 909 hátalarar, 500 watt, frá 98, til sølu. Ring 224791 ella
*312185, Mariann*

## Ymiskt

**NOKIA 6210**
uml. 1/2 ára gomul, til sølu fyri 2.200 kr.
*Tlf. 26210188*

**FARTELEFON**
Nokia 8210 við etui, ladara, haldara til bil við mikrofon til sølu fyri 1.800 kr.
*Tlf. 223478*

**TIL SØLU**
Inni oljutangi, 1.500 ltr., til sølu fyri 2.000 kr. JÄMÄ oljufýrketil, árg. 98, til sølu fyri 3.000 kr.
*Tlf. 212358*

**TIL SØLU**
6 kvm. laminat (kirsuber), ikki upppakkað, til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 447616*

**YNSKIST**
Snowboard ynskist til keyps.
*Tlf. 315851*

**NOKIA 9210**
3. mðr. gomul, Dk-software uppdaterað við nýggjasta, til sølu fyri 6.800 kr.
*Tlf. 253950*

**TIL SØLU**
Ein telefonsvarari Connexion til sølu fyri 150 kr. – er nýggjur.
*Tlf. 255279*



*Jóanis Erik Køtlum, sjúkrahússtjóri*

*Framhald av síðu 19*

### Fjølmiðlarnir

Einki er at ivast í at partar av fjølmiðlunum eru ógvuliga »svangir« og serliga í hesum førinum havaført eina eirindaleysa, einsíðuga og eftir okkara tykki ógvuliga óetiska kampagnu, til frama fyri nakrar sjúkrasystrar, har argumentini fyri tað mesta hava koyrt uppá kenslur og ikki uppá sakligheit. Tað skal hervið verða sagt at tað ikki eru øll fjølmiðlafólk, sum hava verið við í hesum, men serliga Sjónvarp Føroya hevur víst seg heskið.

Sjúkrahúsleiðslan hevur í fleiri førum heitt á Sjónvarp Føroya um ikki at taka myndir upp inni á Landssjúkrahúsinum, uttan loyvi frá sjúkrahúsleiðsluni, tí sjúkrahúsleiðslan metir hesar upptøkur vera órógvandi bæði fyri sjúklingarnar og fyri arbeiðið á sjúkrahúsinum. Eisini er virksemi inni á Landssjúkrahúsinum umfatað av tagnaðarskyldu.

Hóast hetta hevur Sjónvarp Føroya, uttan at spyrja eftir fleiri ferðir verið inni á Landssjúkrahúsnium og gjørt sokallað »happenings«, møguliga fyri at leggja trýst á myndugleikarnar.

### Politiski mynduleikin

Politiski myndugleikin hevur í hesum málið verið stinnur og hevur ikki blandað seg uppí innanhýsis mál á Landssjúkrahúsinum hóast stórt trýst frá umverðini. Hetta má sigast at vera gott og er ein avgjørd treyt fyri at leiðlsan á einum stovni kann virka nøktandi.

### Sjúkrahúsleiðslan

Út frá greinini kann ein fáa tað fatan, at ávísir limir í sjúkrahúsleiðsluni eru beinleiðis umboð fyri ávísar fakbólkar. Hetta er ikki rætt. Sjúkrahúsleiðslan er ein trímannað leiðlsa fyri alt Landssjúkrahúsið, samansett av einum læknastóra, einum sjúkrarøktarstjóra og einum sjúkrahúsleiðara hvør við sínum fakliga innliti.

### Støðan á Landssjúkrahúsinum

Um vit hyggja at fysisku rammunum á Landssjúkrahúsinum er eingin, sum ivast í at her skal eitt megnartak gerast um teir skulu koma uppá eitt virðuligt støði. Her kann tó sigast at vera gongd í málinum og sjónliga prógvið uppá hetta er nýbygningurin sum nú er í ger. Hesin nøktar ikki allar funktiónir á Landssjúkrahúsinum og tí verður í løtuni arbeitt við, at fyrireika projektering av eini umbygging, sum hevur til endamáls at nøkta tørvin á resterandi funktiónum. Her ræður tí um, at hava tol, tí tað er gongd í málinum.

Átrokandi arbeiðir verða eisini gjørd so hvørt tørvur er á tí og sum fíggjarligi karmurin loyvir. Í ár 2001 eru t.d. allir køkarnir á Landssjúkrahúsinum settir í stand, svarandi til krøv frá Heilsufrøðiligu starvstovuni. Harafturat er íløga gjørd fyri at seta handvask upp á D7 eftir tilmæli frá hygiejnunevndini. Netsamband og teldur eru fingin til vega til allar deildir. Hetta er bert nøkur dømi.

Hvat viðvíkur tólaparkini kann sigast, at medicoteknisku tólini og nú eisini sjúkrabilarnir eru á einum støði, sum ikki er til at skammast yvir. Harafturímóti er hjálpiútgerðin til røktarstarvsfólki afturútsigld, her kann m.a. nevnast sengur og koyristólar. Hetta verður tí eitt av raðfestu økjunum í 2002 og frameftir- var avgjørt og byrja mitt í 2001.

Viðvíkjandi tí um starvsfólkaorkan svarar til tað virksemi, sum er á Landssjúkrahúsinum, so er at siga, at man koyrir við rammujáttan har leiðslurnar, í tann mun tað letur seg gera, kunnu stýra virkseminum innanfyri. Er tørvurin á virksemi størri enn tann ramman loyvir, er tað uppgávan hjá ymisku leiðslunum (deildar, depils- og sjúkrahúsleiðslu), at fáa játtandi myndugleikan sannførdan um, at meiri peningur skal til og at greiða frá hvørjar avleiðingar tað fær um peningur ikki verður tilførdur. Áðrenn hetta verður gjørt er tó neyðugt, at royna allar møguleikar fyri rationalisering og umskipan, sum kunnu viðføra betri gagnnýtan av m.a. starvsfólkunum.

Út fra viðgerðini av aktuella málinum í fjølmiðlunum, kundi man fingið tað uppfatan at sjúkrahúsleiðslan ikki ynskir at tað verða tilførdur peningur til Landssjúkrahúsið. Til hetta hava vit tað viðmerking, at sjúkrahúsleiðslan til figgjarlógina 2002, bert hevur fingið ca. 10% av tí umsøkta; Hetta er soleiðis tann politiska avgerðin.

### Sjálvtøkuborð

Tygum stilla nakrar spurningar til sjúkrahúsleiðsluna, sum eru endurgivnir niðanfyri.

1. Er tað í lagi við kollektivum ella kollektivlíknandi uppsagnum?
2. Er tað í lagi at brúka fjølmiðlar til at kroysta leiðsluna til at taka avgerðir til fyrimunar fyri ávísar bólkar og øki á Landssjúkrahúsinum?
3. Er tað í lagi, at fakfeløg eru hjástødd, tá játtan og normering á deildum skal viðgerast í leiðsluni?
4. Og um so er, eru hesi viðurskifti galdandi fyri allar bólkar og øki á Landssjúkrahúsinum?

Sjúkrahúsleiðslan hevur fylgjandi svar uppá spurningarnar:

**Ad 1)** Tað er ikki í lagi við kollektivum uppsøgnum, tí hesar eftir okkara tykki eru ólógligar. Um uppsagnirnar eru at uppfata sum kollektivt kampstig er til dómstólin at avgerða.
**Ad 2)** At brúka fjølmiðlarnar at kroysta leiðsluna er heldur ikki rætt eftir okkara tykki. Hetta verður mett at vera illoyalt og undirgravandi fyri leiðsluna á stovninum.
**Ad 3)** Tað er ikki í lagi, at fakfeløg eru við tá játtan og normering á deildunum skulu viðgerast í leiðsluni, tí hetta er ein reinur leiðsluspurningur. At Sjúkrasystrafelag Føroya var við hesum serliga føri, var tí tær høvdu boðið seg fram sum part í semingsroyndunum ímillum leiðsluna og sjúkrasystrarnar á B6.
**Ad 4)** Sum tað framgongur av svarunum omanfyri so eru hesi viðurskifti ikki galdandi fyri nakran bólk ella øki á Landssjúkrahúsinum.

At enda vónar sjúkrahúsleiðslan ikki framyvir at fara at uppliva líknandi mál, men at viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum framyvir verða viðgjørd innanhýsis, har loysnirnar skulu finnast.



*Marin Vang, røktarfakligur stjóri*

**HUGNAKVØLDIÐ**
á Keldu í Skálavík við føroyskum dansi, dansispølum gamlamannadansi verður 12. jan. kl. 20.00. Tilmelding áðrenn mikudagin kl. 18.00 á tlf. 361362, 361164, 361254 ella 361359. Sí annars uppsløgini í handlunum. Dansifeløgini í oynni.

**TIL SØLU**
Sproytikabina, 7 kw motor, til sølu.
*Tlf. 443131 ella 220931*

**RÁGLAS RÚTUR**
115 cm høgur, 51 cm breiður, til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 213491*

**OLJUTANGI TIL SØLU**
Góður 1500 l. úti oljutangi selist bíliga.
*Tlf. 222513*



# HEILSANIR



**Góða, fitta Sólvá**
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum í dag. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Bestu heilsanir frá Angelu, Heidi, babba og mammu**



**Góða, elskaða Sigrið**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 7. januar.
**Mamma og babba**



**Góðu tit bæði**
Hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum, ið var 1. januar. Vit ynskja tykkum nógv góð ár í framtíðini.
**Heilsan, vit norði í Sundinum**



**Góði, elskaði Jón!**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag, 5. januar. Jesus signi framtíð tína. Vit elska teg.
**Mamma og babba**



**Góði Jón**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag.
**Heilsan, omma, Dia og Daniel**



**Góði, elskaði Jón**
Hjartaliga tillukku á 1 ára degnum ynskja **omma, abbi og Ari gubbi**



Tillukku frøken Myllhamar við teimum 21. Tú riggar væl at selja pizza á Sjómansheiminum.
**Lítla systir Jórun**



**Góði Búi**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum ynskja
**omman og Janus**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mið-degi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..................................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**